# Úttøkuskipan til HM 2022

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til HeimsMeistarastevnuna á langgeil sum verður í Budapest í Ungarn 18. juni - 3. juli 2022, har sjálv svimjistevnan er 18. - 25. juni 2022.

Sjálvar kravtíðirnar til einstaklingakappingar eru sum ásettar av altjóða svimjisambandinum FINA, sí https://www.fina.org/competitions/2902/fina-world-championships-budapest-2022/info. Gevið gætur at hesar skulu klárast á serliga FINA góðkendum stevnum.

Tað vil siga við A og B kravtíðum, har B-kravtíðin kann nýtast um einans ein luttakari er í viðkomandi kappingargrein, og A-kravtíðin ífall at tveir luttakarar av sama kyni vilja luttaka í somu grein.

Reglur FINA loyva hartil at vit kunnu taka út eyka svimjarar, upp til og við at hópurin er tilsamans tvær (2) kvinnur og tveir (2) menn. Hesir eyka svimjarar kunnu tá í mesta lagi luttaka í tveimum (2) greinum, og væl at merkja ikki í somu grein sum nakar annar av okkara.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar til liðsvimjing.

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2022.

Úttøka av juniorum koma upp á tal, serliga um færri enn tveir seniorar av hvørjum kyni klára kravtíð. Gevið gætur at FINA hevur ásett minstaaldur á 14 ár fyri kvinnur og 15 ár fyri menn.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 9. juli 2021 (FML 2021), til og við 25. apr. 2022 (Atlantic Open 2022)

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:

http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS

# Kravtíðir til HM 2022

At klára á langgeilastevnum góðkendar av FINA sum úttøkustevnur til HM 2022

| Kravtíðir - Kvinnur | | | Kravtíðir - Menn | |
|---|---|---|---|---|
| **B - 1 svimjari** | **A - 2 svimjarar** | | **A - 2 svimjarar** | **B - 1 svimjari** |
| 0:25.92 | 0:25.04 | **50 frí** | 0:22.18 | 0:22.96 |
| 0:56.15 | 0:54.25 | **100 frí** | 0:48.77 | 0:50.48 |
| 2:02.81 | 1:58.66 | **200 frí** | 1:47.06 | 1:50.81 |
| 4:19.34 | 4:10.57 | **400 frí** | 3:48.15 | 3:56.14 |
| 8:56.03 | 8:37.90 | **800 frí** | 7:53.11 | 8:09.67 |
| 17:24.20 | 16:29.57 | **1500 frí** | 15:04.64 | 15:36.30 |
| 0:29.21 | 0:28.22 | **50 rygg** | 0:25.17 | 0:26.05 |
| 1:02.71 | 1:00.59 | **100 rygg** | 0:54.03 | 0:55.92 |
| 2:15.67 | 2:11.08 | **200 rygg** | 1:58.07 | 2:02.20 |
| 0:32.31 | 0:31.22 | **50 bringa** | 0:27.33 | 0:28.29 |
| 1:09.79 | 1:07.43 | **100 bringa** | 0:59.75 | 1:01.84 |
| 2:31.02 | 2:25.91 | **200 bringa** | 2:10.32 | 2:14.88 |
| 0:27.24 | 0:26.32 | **50 firvald** | 0:23.63 | 0:24.46 |
| 1:00.37 | 0:58.33 | **100 firvald** | 0:51.96 | 0:53.78 |
| 2:13.73 | 2:09.21 | **200 firvald** | 1:56.71 | 2:00.79 |
| 2:17.63 | 2:12.98 | **200 blandað** | 1:59.76 | 2:03.95 |
| 4:52.97 | 4:43.06 | **400 blandað** | 4:17.48 | 4:26.49 |

ATLANTIC AIRWAYS